


*Skoda Roomster verður ein rættuliga sermerktur bilur. Designið er smart við eyðkenda Skoda kølaragittarinum*




*Roomster verður ein praktiskur familjuvinarligur bilur við sera liðiligari innrætting*

# Endaligu myndirnar av Skoda Roomster

**Vit hava fyrr víst myndir av nýggja Skoda Roomster, sum eftir ætlan kemur á marknaðin seinni ár. Men her hava vit tær endaligu myndirnar av hvussu bilurin kemur at síggja út**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Konseptbilurin Skoda Roomster varð fyrstu ferð sýndur fram á Frankfurt Motorshow í 2003 sum ein minivan.

Lidni bilurin verður alment sýndur fram á altjóða bilaframsýningini í Geneve sum letur upp síðst í hesum mánaðinum. Bilurin verður framleiddur á eini nútímans verksmiðju í Kvasiny í Kekkia. Hetta er sama verksmiðja, sum framleiðir luksusbilin Skoda Superb.

Skoda Roomster verður bygdur yvir ein felags Skoda/VW plattform. Designið er smart, og bilurin verður praktiskur og familjuvinarligur. Tá hesin kemur, verða fýra ymisk Skoda-modell á marknaðinum, luksusbilurin Skoda Superb, miðalklassabilurin Skoda Octavia, tann minni Skoda Fabia og so Roomster, ið er tann einasti, sum ikki er ein vanligur sedan ella stationcar.

Tað mest sermerkta við bilinum er innrættingin. Roomster kann lættliga gerast um til vøruvogn. Innrættingin verður sera liðilig, t.d. kunnu baksetrini flytast heilar 75 cm aftur og fram. Bilurin verður stuttur og lutfalsliga breiður, umleið 4 metrar langur og yvir 180 cm breiður.

Motorskráin umfatar tríggjar bensin- og tríggjar dieselmotorar. Eisini verður møguleiki fyri automatgirum.

Bilurin kemur á marknaðin í flestu evropeisku londunum í summar, men verður ikki í Danmark og í Føroyum fyrr enn síðst í hesum í árinum.

# Cadillac í Trollhättan

Í síðstu viku byrjaði eitt nýtt tíðarskeið hjá Saab og Cadillac, tá fyrsti Cadillac BLS koyrdi út av samlibandinum hjá Saab í Trollhättan í Svøríki.

Tað er General Motors sum eiga bæði bilmerkini.

Hetta var ein søgulig hending hjá 56 ára gomlu verksmiðjuni í Trollhätten.

Framleiðslan av luksusbilinum Cadillac BLS er løgd í Svøríki fyri at vera nærri tí vaksandi marknaðinum hjá Cadillac í Evropa og aðrar staðir í heiminum.

Fyri at kunna gera Saab og Cadillac á somu verksmiðju, hava General Motors gjørt eina íløgu upp á tilsamans 2,5 milliardir krónur.

*Kelda: Motor Magasinet*





· Umvæling av tryggingarskaðum og privat skaðum
· Vit umvæla øll bilmerki
· Klárgering til sýn
· Bremsur, útstoyt, stoytdoyvarar, rustarbeiði o.m.a.



Ring og fá eitt tilboð

**Sp/f Plátuverkstaðið**
Falkavegur · Tórshavn · Tel 321778 ella 221778
Teldupostur: plv@plv.fo